Fylgiskjal 1.

# Tilmæli um skipan fyri veiðigjøld frá 2021 og frameftir

Samgonguskjalið sigur um veiðigjøld, at:

*"Tilfeingisgjaldið verður eitt yvirskotsgrundað gjald, sum tekur hædd fyri rentu-, olju- og fiskaprísi, soleiðis at inntøkur landsins út frá verandi fortreytum verða umleið á sama støði sum í 2018"*

Landsstýrismaðurin hevur tí sett arbeiðsbólk umboðandi vinnu og fyrisiting at koma við einum uppskoti um eina nýggja skipan. Umframt orðingina í samgonguskjalinum hevur arbeiðsbólkurin lagt seg eftir, at skipanin skal vera einføld hjá vinnu og fyrisiting at virka undir.

Arbeiðsbólkurin hevur á fundum í tíðarskeiðnum september til desember 2020 viðgjørt ymsar tættir í arbeiðssetninginum og mælir við hesum til eina skipan at áseta veiðigjøld.

## Meginreglur

Veiðigjald er gjald fyri at troyta fiskatilfeingi. Fyri at gjaldið ikki skal vera vinnuliga skeiklandi og ikki skal virka sum ein eyka skattur er neyðugt, at skipini rinda sama gjald fyri sama fiskaslag.

Tað hevur týdning, at gjaldið er gjøgnumskygt og einfalt at umsita, og at gjaldið samsvarar ella onkursvegna stendur mát við virðið á rættindunum.

At gjaldið er einfalt og lætt at umsita merkir millum annað, at gjaldið skal vera reiðarí og manning kunnugt, áðrenn farið verður til fiskiskap, og møguligt skal vera at gera upp endaliga eftir loknan túr.

Arbeiðsbólkurin hevur tikið støði í, at inntøka landsins tilsamans var 303 mió. kr. í veiðigjøldum og uppboðssølugjøldum í 2018. Í 2019 var henda upphædd samlað 369 mió. kr., meðan tað fyri árini 2020 og 2021 verður roknað við 314 mió. kr. í inntøkum á fíggjarlógini.

Vinnuumboðini í arbeiðsbólkinum gera vart við, at føroysk veiðigjøld sum heild eru væl hægri enn samsvarandi gjøld í grannalondunum. Umráðandi er, at funnin verður ein støðug langtíðarsemja um skipan við veiðigjøldum, soleiðis at hon ikki verður broytt við jøvnum millumbilum. Grundarlagið fyri arbeiðnum hevur verið, at landið skal hava umleið 300 mió. kr. í inntøku við hesi skipan frá komandi ári, og vinnuumboðini gera vart við, at hetta grundarlagið er samansett av einum veiðigjaldi og einum væl hægri uppboðssølugjaldi. Tí gerast veiðigjøldini í fiskivinnuni sera høg í mun til umsetning og úrslit hjá flotanum. Eisini er neyðugt at taka atlit til øll skipini í flotanum, av tí at munur er á kvotagrundarlagnum hjá teimum ymsu skipunum.

Avmarkingar

Skipanin við veiðigjøldum er avmarkað til tey fiskasløg, sum í dag hava eitt ásett veiðigjald. T.e. makrelur, norðhavssild, svartkjaftur og botnfiskur í Barentshavinum og við Svalbard. Hendan avmarking er gjørd tí, at tað er serliga har, at fíggjarligu úrslitini samlað sæð hava verið góð seinastu árini.

Umboðini fyri fyrisitingina gera vart við, at sum frá líður eigur ein skipan um veiðigjald at vera galdandi fyri allan fiskiskap.

Grundarlagið fyri veiðigjaldinum

Sambært samgonguskjalinum skal gjaldið vera yvirskotsgrundað og taka atlit til fiskaprísir, oljuprís og rentustøði. Arbeiðsbólkurin er samdur um, at skilabest er við eini einfaldari skipan, sum er løtt at virka undir hjá vinnu og fyrisiting. At taka atlit til fleiri viðurskifti í vinnuni samsvarar ikki við ynskið um eina einfalda skipan.

Í mun til fiskaprísin, eru kostnaðir, so sum oljuprísur og rentustøði, av lutfalsliga væl minni týdningi.

Tí metir arbeiðsbólkurin, at óneyðugt er at taka atlit til ov nógv broytilig viðurskifti. Yvirskipaða tilmælið frá arbeiðsbólkinum er, at bert fiskaprísurin verður brúktur sum grundarlag fyri veiðigjaldinum.

Eru ynski um at taka hædd fyri broytingum í oljuprísi og rentustøði, hevur arbeiðsbólkurin gjørt dømi um hetta (sí skjal 2).

Veiðigjald fyri uppsjóvarfisk

Arbeiðsbólkurin hevur kannað, um til ber at brúka útlendskar marknaðarprísir, fyri at tryggja, at ikki verður møguligt at ávirka miðal avreiðingarprísin og harvið veiðigjaldið. Í hesum sambandi hevur verið hugt at norskum avreiðingarprísum hjá Sildelaget, men komið er eftir, at norsku prísirnar í stigi og sveiggi ikki fylgja føroysku prísgongdini. Eisini verða hesir prísir gjørdir upp í fremmandum gjaldoyra, og hetta kann við tíðini hava tilvildarliga ávirkan á veiðigjald hjá føroyskum skipum, sum avreiða í donskum krónum.

Arbeiðsbólkurin metir tískil ikki, at skynsamt er at nýta norskar avreiðingarprísir og hevur heldur valt at nýta føroyskar avreiðingarprísir, sum kunnu fáast til vega ígjøgnum avreiðingarseðlar hjá Vørn fyri uppsjóvarfisk.

Ein møguligur vansi kann vera, at samanfall kann vera millum eigarar av virkjum og skipum, og at hetta kann ávirka avreiðingarprísin. Hetta verður tó ikki mett at hava týðandi ávirkan, tí at talan er um nógv skip, sum gera nógvar einstakar túrar. Harafturat er gjaldið ásett framman undan at fiskað verður og verður tillagað árið eftir.

Tí er trupult hjá einum einstøkum skipi at ávirka veiðigjaldið. Øll skip fara at rinda tað sama veiðigjaldið í krónum og oyrum, soleiðis at reiðarí og manning hava áhuga í einum høgum avreiðingarvirði, har veiðigjaldið er ein lutfalsliga lægri partur av virðinum.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað hevði verið ein trygd fyri prísásetingina í Føroyum, um ein partur av veiðuni kann avreiðast uttanlands. Hetta hevur serliga víst seg at vera ein avbjóðing, tá tað við hvørt bert er ein veruligur keypari á marknaðinum. Tí er tilmæli frá arbeiðsbólkinum, at sjófeingislógin verður broytt soleiðis, at partur av samlaðu veiðuni aftur skal kunna avreiðast uttanlands.

Gjaldið er eitt kilogjald á hvørt fiskaslag, og gjaldið verður lýst í juli at vera galdandi frá 1. august til 31. juli árið eftir. Orsøkin til, at gjaldið verður ásett um summarið, er, at tá er ein natúrligur steðgur í fiskiskapinum eftir uppsjóvarfiski, meðan hann um veturin vanliga er í hæddini við ymiskum fiskasløgum. Hetta gevur vinnuni vissu fyri, hvussu stórt gjaldið er, tá fiskiskapurin verður lagdur til rættis fyri tær ymsu vertíðirnar.

Grundarlagið fyri veiðigjaldinum er miðalavreiðingarprísurin fyri óviðgjørdan, feskan makrel, norðhavssild og svartkjaft, sum føroysk skip hava avreitt fyri í tíðarskeiðnum 1. juli til 30. juni árið fyri. Hetta merkir, at bert avreiðingar hjá RSW-skipum (refrigerated sea water) verða roknaðar uppí grundarlagið. Hinvegin verða skip, sum virka veiðuna umborð, ikki tikin við. Á tann hátt verður veiðigjaldið ikki ávirkað av, at fiskur verður virkaður umborð.

Sambært galdandi veiðigjaldslóg verður ikki goldið veiðigjald av kvotum, sum vera útlutaðar til heimaflotan. Í 2020 fekk heimaflotin útlutað sløk 20.000 tons av makreli. Arbeiðsbólkurin hevur ikki viðgjørt spurningin um møgulig veiðigjøld av hesum kvotum.

## Veiðigjald fyri botnfisk

Av tí, at fá føroysk skip fiska botnfisk í Barentshavinum og við Svalbard, er ikki mett umboðandi at nýta hesar avreiðingarprísir sum grundarlag undir gjaldinum. Harumframt hava skipini í fleiri førum ymiskar framleiðslur umborð, og tí kundi eitt veiðigjald, sum var tengt at avreiðingarvirðinum, skeikla valið millum virðisøkjandi virking umborð og á landi. Harumframt verður eisini meira torgreitt hjá myndugleikanum at hava eftirlit við ymsum umrokningarfaktorum.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki funnið brúkiligar útlendskar marknaðarprísir. Hóast fiskiskapur eftir toski í Barentshavinum og við Svalbard ikki beinleiðis kann samanberast við fiskiskap eftir toski undir Føroyum, verður mett, at miðal avreiðingarprísurin á toski á Fiskamarknaði Føroya kann nýtast sum grundarlag fyri áseting av veiðigjaldinum, har prísurin verður umroknaður til krónur fyri hvørt kilo av rundum fiski.

Fiskað verður í Barentshavinum og við Svalbard alt árið. Tí mælir bólkurin til, at veiðigjaldið verður ásett at galda frá 1. januar til 31. desember, grundað á miðalprísir á fiskamarknaðinum 1. desember til 30. november árið fyri.

Toskur er tann størsti parturin (umleið 85%) av botnfiskakvotuni í Barentshavinum og við Svalbard, og tí verður avgjaldið fyri tosk eisini nýtt sum avgjald fyri annan botnfisk, hóast toskaprísurin vanliga er tann hægsti miðalprísurin fyri hesi fiskasløg.

Atlit til sveiggjandi kvotur

Umrøtt hevur verið, um atlit skulu takast fyri sveiggjandi kvotum soleiðis, at gjaldið lækkar, tá kvoturnar minka serliga nógv. Tað sum talar fyri hesum er, at eitt høgt gjald kann virka serliga tyngjandi, tá ið lítið er at fiska. Tilmælt verður, at fer føroyska kvotan undir 50% av miðal tøku kvotuni til føroysk fiskifør seinastu 5 árini, minkar veiðigjaldið niður í 50% av roknaða gjaldinum fyri tað árið (sí skjal 3).

Áseting av veiðigjaldi

Veiðigjaldið tekur útgangsstøði í ásettu veiðigjøldunum fyri 2020, har gjaldið verður stigvaksandi soleiðis, at verður prísurin høgur verður lutfalsliga meira goldið í veiðigjaldi. Øvugt, er prísurin lágur, verður gjaldið lutfalsliga lægri (sí skjal 1).

Fyrimunurin við einum kilogjaldi er, at tað er einfalt at umsita hjá vinnu og fyrisiting, og tað er eins fyri øll skip. Tað ger, at tann, sum megnar at fáa meira burturúr, sjálvur fær vinningin av hesum.

Ein vansi kann vera, at gjaldið altíð er eitt ár afturút og tí kann raka skeivt í mun til galdandi marknaðarprísir. Sum frálíður fara hesi sveiggj at javna seg. Mett verður, at fyrimunirnir við einum slíkum gjaldi eru størri enn vansarnir.

Frameftir

Arbeiðsbólkurin vísir á, at uppboðssølugjaldið fyri 8 ára rættindi, ið eru seld í 2018 og 2019, halda áfram til 2026 og 2027. Fram til 2027 lækka inntøkur landsins nakað, tí at uppboðssølugjøldini eru hægri enn veiðigjøldini, sum koma ístaðin. Tí mælir arbeiðsbólkurin til, at hetta verður tikið við tá skipanin verður eftirmett, sum hóskandi kundi verið í 2025.

Arbeiðsbólkurin:

Djóni Højgaard, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið

Atli Suni Leo, ráðgevi, Fíggjarmálaráðið

Rúna Guttesen, løgfrøðingur, TAKS

Jóhan Simonsen, deildarleiðari, Vørn

Jan Klein Olsen, løgfrøðingur, Vørn

Hanus Hansen, Reiðarafelagið

Stefan í Skorini, Reiðarafelagið

Jógvan Jespersen, Felagið Nótaskip

Fróði Sivertsen, grannskoðari, ráðgevi fyri Reiðarafelagið.

# Skjal 1 – Veiðigjaldstalva

| | 2021 og fram | | |
|---|---|---|---|
| | fiskaprísur | | veiðigjald |
| | Frá | til | % |
| Svartkjaftur | 0,00 | 1,30 | 11,0% |
| | 1,30 | 1,50 | 12,0% |
| | 1,50 | 1,70 | 13,0% |
| | 1,70 | 1,90 | 14,0% |
| | 1,90 | 2,10 | 15,0% |
| | 2,10 | 2,30 | 16,0% |
| | 2,30 | | 17,0% |
| | | | |
| Sild | 0,00 | 2,50 | 15,5% |
| | 2,50 | 3,00 | 16,0% |
| | 3,00 | 3,50 | 16,5% |
| | 3,50 | 4,00 | 17,0% |
| | 4,00 | 4,50 | 17,5% |
| | 4,50 | 5,00 | 18,0% |
| | 5,00 | 5,50 | 18,5% |
| | 5,50 | 6,00 | 19,0% |
| | 6,00 | | 19,5% |
| | | | |
| Makrelur | 0,00 | 6,00 | 17,5% |
| | 6,00 | 6,50 | 18,0% |
| | 6,50 | 7,00 | 18,5% |
| | 7,00 | 7,50 | 19,0% |
| | 7,50 | 8,00 | 19,5% |
| | 8,00 | 8,50 | 20,0% |
| | 8,50 | 9,00 | 20,5% |
| | 9,00 | 9,50 | 21,0% |
| | 9,50 | | 21,5% |
| | | | |
| Botnfiskur | 0,00 | 13,50 | 2,50% |
| | 13,50 | 14,00 | 2,75% |
| | 14,00 | 14,50 | 3,00% |
| | 14,50 | 15,00 | 3,25% |
| | 15,00 | 15,50 | 3,50% |
| | 15,50 | 16,00 | 3,75% |
| | 16,00 | 16,50 | 4,00% |
| | 16,50 | 17,00 | 4,25% |
| | 17,00 | 17,50 | 4,50% |
| | 17,50 | 18,00 | 4,75% |
| | 18,00 | | 5,00% |

dømi:

Miðal avreiðingarprísur fyri makrel juli 2020-juni 2021 er 8.00 kr/kg:

Veiðigjald er 20%

Veiðigjald fyri makrel 1. Aug 2021 til 31. Jul 2022: 8,00 kr/kg x 20% = 1,60 kr/kg

# Skjal 2 – Oljuprísur

Miðaltøl í vinnuni vísa at útreiðslurnar til olju er um 10% av avreiðingarvirðinum. Eitt uppskot kundi tí verið at stilla 10% av veiðigjaldinum við lutfalsligu broytingini í oljuprísinum. Í hesum føri hevði man brúkt altjóða markaðarprísir fyri olju og samanborið oljuprísin tá veiðigjaldið verður lýst við oljuprísin eitt ár áðrenn.

Dømi:

| | | Veiðigjald |
|---|---|---|
| Avreiðingarvirði | 100% | 1,65 |
| Olja % | 10 | 0,17 |
| Broyting í oljuprísi % | -25 | -0,04 |
| Veiðigjaldið | | 1,69 |

# Skjal 3 – Sveiggjandi kvotur

| Ár | Makrelur | Norðhavssild | Svartkjaftur |
|---|---|---|---|
| 2016 | 95.723 | 43.587 | 193.332 |
| 2017 | 107.875 | 113.097 | 369.609 |
| 2018 | 86.245 | 79.950 | 393.581 |
| 2019 | 62.554 | 115.515 | 324.908 |
| 2020 | 95.778 | 104.848 | 324.696 |
| Miðal | 89.635 | 91.399 | 321.225 |
| | | | |
| 50% | 44.818 | 45.700 | 160.613 |

Dømi:

Um tøka kvotan fyri makrel í 2021 hjá føroyskum fiskiførum hevði verið minni enn 44.818 tons hevði bert verið goldið 50% av roknaða gjaldinum í 2021